Hoyvík 19. apríl 2023

Til Løgtingsins Vinnunevnd

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um grundvatn

Bóndafelag Føroya loyvir sær við hesum at gera nakrar beinleiðis viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um grundvatn, sum í løtini er til viðgerðar í Løgtingsins Vinnunevnd. Uppskotið var ikki sent felagnum til hoyringar.

Sum heild verður tikið undir við uppskotinum, men bóndafelagið hevur tó rættuliga stóran ampa av allýsingini í § 2 og teim tilhoyrandi viðmerkingunum. Orsøkin er, at kelduvatn á yvirflatuni eisini verður roknað sum grundvatn. Harvið kemur nógv vatn í høgunum undir lógina, hóast hetta ivaleyst ikki hevur verið ætlanin við lógaruppskotinum.

Fyri at rætta hetta verður skotið verður upp at seta eitt nýtt stk. 2 inn í § 2 við soljóðandi orðing:

"Løgtingslógin fevnir um grundvatn, sum komið er fram á í sambandi við boring."

Mælt verður eisini til, at serligu viðmerkingarnar verða rættaðar samsvarandi hesum í nevndarálitinum.

Verður uppskotið broytt á henda hátt er allir ivi burtur um, hvørt vatn á yvirflatuni eisini kemur undir lógina.

Bóndafelagið er til reiðar at koma í Vinnunevndina at greiða frá.

Vinarliga

Sigert Patursson
Formaður, Bóndafelag Føroya